# Elisabeth Pike sýnir í Klaksvík

Elisabeth Pike búði síni fyrstu barnaár í Klaksvík. Hon er dóttir Niels Joensen úr Hvannasundi. Hon flutti síðani til Havnar og seinni út í heim. Mest partin av lívinum hevur hon búð í Kanada. Har hevur hon tikið listarliga útbúgving á universitetinum í Toronto. Hon hevur havt nógvar framsýningar m.a. í Toronto, Danmark, Íslandi og í Føroyum. Elisabeth Pike fer at hava framsýning í Miðlan við átta litføgrum akrylmálningum. Myndevnini eru føroysk – m.a. dansur, dansinátt og kvøld – og eisini meiri almenn evni. Málningarnir hanga í Miðlan til 20. juli, og er framsýningin opin gerandisdagar frá 10.00 til 16.00.



# rap mammu og pápa



*Elisabeth Eldevig, Rita Syderbø og Anna Háberg greiða í greinini frá, hvussu tað var, tá foreldrini doyðu í ferðsluvanlukku. Og tær undrast á ta hjálp og viðgerð, sum tey avvarðandi fingu á Landssjúkrahúsinum.*
*– Eingin tosaði um sálarliga kreppuhjálp. Sjálvt ommu- og abbasonurin, sum hevði verið við í bilinum fekk einki tilboð um sálarliga hjálp. Tá ið tað var staðfest, at hann ongan likamligan løst hevði fingið, var hann útskrivaður sama dag, greiðir Anna Háberg frá*

Mamman var deyð, áðrenn hon var koyrd í sjúkrabilin, men hetta vistu børnini ikki. Og eingin kunnaði tey um tað.

– Eingin kundi siga okkum nakað, og vit fingu ikki loyvi at fara úr lítla rúminum, leggur Anna afturat.

Í tveir tímar vistu tey einki, uttan tað at pápin var deyður. Tey vistu ikki, um tað stóð um lív hjá hinum, og tey vistu ikki, um tað var pápin, sum hevði skyldina av vanlukkuni.

## Tørv á hjálp

Hóast tær hava havt hvørja aðra og hini systkini, so eru tær trúggjar systrarnar samdar um, at fólk, sum uppliva so brádligan og ógvusligan miss, hava brúk fyri sálarligari hjálp.

– Tá vit hugsa aftur á dagin úti á Landssjúkrahúsinum, undra vit okkum á ta ráðgeving og hjálp, vit sum avvarðandi fingu, sigur Elisabeth.

Tá familjan endiliga slapp úr rúminum, var tað løgreglan, sum stóð klár at taka yvir. Løgreglan greiddi teimum frá, hvat var hent, og systrarnar eru samdar um, at kunningin frá løgregluni var framúr.

- Men tá løgreglan kom, slepti Landssjúkrahúsið, og starvsfólkini trektu seg aftur, sigur Rita. Eingin segði nakað um sálarliga kreppuhjálp.

Sjálvt ommu- og abbasonurin, Jann, fekk einki tilboð um sálarliga hjálp. Tá ið tað var staðfest, at hann ongan likamligan løst hevði fingið, var hann útskrivaður sama dag.

– Hann, sum hevði upplivað og sæð ommu og abba sín lata lív á ein so skilaleysan hátt, var bara sendur heim, sigur Anna hugsunarsom.

– Beint tá hugsaðu vit ikki um tað, vit royndu bara at klára tað praktiska, sigur Elisabeth.

–Men professionel heilsustarvsfólk áttu at sæð og kunna okkum um tørvin á sálarligari hjálp, staðfestir hon. Systrarnar nikka.

## Endi

Nógv fólk vóru til jarðarferðina, og nógv hava sýnt sína samkenslu. Rosa og Ditleif vóru avhildin fólk. Men tey eru farin.

Húsini í Fuglafirði eru nú ruddað, og hálvtómi kaffikoppurin við reyðari varrastift á, sum stóð á borðinum í køkinum sum seinasta heilsan frá mammuni, er tømdur og vaskaður. Seinasta bókin, sum pápin las, 90 Minutter i Himmelen, er eisini niðurpakkað. Hon minnir á vónina, men eisini á veruleikan. Tey eru ikki her.

– Fólk siga so nógv løgið, tá tey royna at vísa samkenslu. Onkur hevur sagt, at tað var Guds vilji, og onkur hevur sagt, at tá tú hevur gudstrúgv, hevur tú ikki tørv á sálarligari hjálp. Men hetta er fullkomiliga misskiltur uggi, sigur Elisabeth.

Tær nikka allar. Kanska kundu tær funnið upp á at hugsa okkurt líknandi fyri tveimum árum síðani. Men í dag vita tær betur. Ferðsludeyðin rakar hart.